Kvinnur: HB – B68 4-2 (0-2)

# HB vendi dystinum

**Eftir at hava verið aftanfyri við tveimum málum í steðginum vísti unga HB-liðið dirvi og mót í seinna hálveiki og vendi dystinum til egnan fyrimun. HB vann sostatt sín fyrsta dyst í landskappingini í ár**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Ikki vóru tey mong, sum væntaðu, at HB fór at hava nakran møguleika at hótta B68-liðið, sum var á vitjan í Gundadali sunnudagin. B68 var favorittur undan dystinum, og HB hevði tveir teir seinastu dystirnar lagt rygg til lemjandi tap móti KÍ og B36. HB kvinnurnar gjørdu tó øllum spádómum til skammar.

### Langskot frá miðjuni

Tað var tó B68, sum setti seg á dystin frá byrjan av, og longu eftir átjan minuttir, hevði B68 fingið tvey mál.

Irdi Hansen, sum fyrr hevur spælt við NSÍ, fekk bæði málini hjá B68. Tað fyrra var eitt langskot frá miðjum vølli. Hon fekk fatur í einum leysum bólti og gjørdi ikki mætari enn at langa til úr eini 40 metra fjarstøðu. Eitt sera vakur mál, og tað er ógvuliga sjáldan, at mál verða skotin so langt úti frá.

Hetta var eftir bert átta minuttir, og longu tíggju minuttir seinni lá bólturin aftur í málinum hjá HB. Irdi Hansen var enn einaferð á rætta staðnum, eftir eitt gjøgnumbrot í høgru síðu. Bólturin endar hjá vandamikla áleyparanum, sum setir bóltin í netið.

Nógv ferð var á álopsspælinum hjá B68 hesa fyrstu løtuna, og HB hevði ilt við at fóta sær. HB hevði eisini bóltin nógv ta seinnu løtuna av fyrra hálvleiki, men einki spurdist burturúr, og álopini gjørdust sjáldan vandamikil.

Tað var hinvegin B68, sum skapti fleiri aðrar góðar málmøguleikar fyri steðgin. Men málverjin hjá HB, tann blaðunga Randi Skylv Wardum, var ein sannur brandur í HB-málinum. Eftir tey bæði málini tók hon alt, sum B68 álopið hevði at bjóða, og hon hevði fleiri framúr góðar bjargingar.

### Vent í holuni

Hóast máltalvan vísti 0-2, fall HB ongantíð í fátt. Eftir steðgin kom meira ferð á tað offensiva spælið hjá HB, ið var sum hamskift eftir steðgin. Spurningurin var tó, um HB megnaði at venda dystinum móti einum B68-liði, sum hevur staðið seg væl í kappingini higartil.

Tað gingu tó fimtan minuttir, áðrenn heimaliðið loksins fekk eitt mál í dystinum, og eftir hetta hugdi HB ongantíð aftur um bak.

Fyrsta málið skeyt Malan á Dunga. Vivian Unadóttir legði trýst á ein verjuleikara hjá B68, soleiðis at bólturin endaði hjá Malan á Dunga, sum tætt undir málinum fekk minka um munin.

Tíggju minuttir seinni vóru aftur boð eftir málverjanum hjá B68. HB fekk fríspark beint uttanfyri hornið á brotsteiginum. Eyðvør Thomsen royndi seg, og bólturin fór beinleiðis í netið. Eitt sera vakur mál, og nú stóð á jøvnum. HB hevði nú sálarliga yvirtakið og fór eftir sigrinum.

### HB framum

Triðja málið fekk Malan á Dunga, tá hon var fyrst á einum bólti tætt undir málinum. B68 megnaði hesa løtuna als ikki at hótta HB-málið, og málverjin hevði lítið at gera eftir steðgin.

Fjórða og síðsta málið fekk Ása úr Dímun. Hon setti høvdið á eitt hornaspark úr høgru síðu, og beindi bóltin í netið.

HB hevði framt einki minni enn eitt bragd, tá tað eydnaðist at venda 0-2 til 4-2. Hesin fyrsti sigurin má fløva væl hjá HB-kvinnunum, eftir at trettan mál vóru farin ígjøgnum í tveimum teimum seinastu dystunum.

Komandi viku hevur HB frí, tí VB hevur tikið seg úr kappingini, og B68 fær ein torføran dyst móti KÍ á Toftum.

**HB – B68 4-2 (0-2)**
0-1: Irdi Hansen
0-2: Irdi Hansen
1-2: Malan á Dunga
2-2: Eyðvør Thomsen
3-2: Malan á Dunga
4-2: Ása úr Dímun

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 6 |
| Malena Jospehsen | KÍ | 4 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 4 |
| Malan á Dunga | HB | 3 |
| Laila Enghamar | B36 | 2 |
| Súsanna Hansen | B36 | 2 |
| Irdi Hansen | B68 | 2 |
| Anja Klæmintsdóttir | GÍ | 2 |
| Eyðvør Thomsen | HB | 2 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 2 |
| Jensa Sirdal | KÍ | 2 |

## 1. deild kvinnur

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 20 | 1 | 19 | 9 |
| 2 B36 | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 3 HB | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 8 | 17 | -9 | 4 |
| 4 B68 | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 3 |
| 5 GÍ | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 13 | -10 | 1 |

# Renning á Norðoyastevnu

**Tíðindaskriv**
*Føroya Bjór*

Eins og undanfarin ár so skipar Ítróttafelagið Treysti fyri tí árligu Føroya Bjór Renningini á Norðoyastevnu. Henda rennikapping er nú blivin ein fastur táttur í leygardagsskránni á Norðoyastevnu og er hetta 6 árið á rað, at runnið verður í miðbýnum. Luttøkan hevur verið sera góð síðani tað byrjaði og er hon voksin hvørt ár, og vóru tað yvir 150 luttakarir við á seinastu Norðoyastevnu. Í ár verður renningin leygardagin 1. juni. Rutan verður tann sama, tvs. at runnið verður eftir Skúlavegi, Gerðagøtu og Biskupsstøðgøtu. Byrjan hjá børnunum verður við við Telefonstøðina, meðan tey vaksnu byrjað við Talvhúsið. Málið hjá øllum verður við Telefonstøðina. Kappingin hjá teimum vaksnu er samstundis 2. umfar í Grand Prix kappingini sum DSF, sum er Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsan Ítrótt, skipar fyri. Sum sæst niðanfyri, so eru aldursbólkarnir hjá børnunum broyttir í mun til undanfarnu ár. Skráin fyri rennikappingina sær annars soleiðis út:

| Kl. | Aldursbólkur | Umfør | Teinur |
|---|---|---|---|
| 12.00 | Vaksin (fødd í 1984 ella fyrr) | 71/2 | 5 km |
| 12.30 | Dreingir-7/Gentur-7 (f.1995 ella seinni) | 1 | 675m |
| 12.40 | Dreingir-10/Gentur-10 (f.1992-1994) | 1 | 675m |
| 12.50 | Dreingir-13/Gentur-13 (f.1989-1991) | 2 | 1.350m |
| 13.00 | Dreingir-17/Gentur-17 (f.1985-1988) | 2 | 1.350m |
| 13.10 | Firma-staffet (3 luttakarir, 1 umfar í part) | 3 x 1 | 3 x 675m |
| 13.20 | Heiðursmerkjahandan og lutakast | | |



### Grand Prix kapping fyri børn

Sum nakað nýtt fer DSF í summar at skipa fyri einari Grand Prix kapping fyri børn, tvs. fyri bæði gentur og dreingir hvør sær. Grand Prix kappingin hjá børnunum verður í fýra umførum. Fyrsta umfar verður á Norðoyastevnu, næsta verður á Eystanstevnu, triðja verður á Vestanstevnu, meðan fjóðra og seinasta umfar verður á Ólavsøku. Kappingin er býtt upp í fýra aldursbólkar, sum eru hesir:

Dreingir-7 /Gentur-7
(f. 1995 ella seinni)
Dreingir-10/Gentur-10
(f. 1992-1994)
Dreingir-13/Gentur-13
(f. 1989-1991)
Dreingir-17/Gentur-17
(f. 1985-1988)

Stigatalvan sum verður brúkt hjá børnunum, verður tann sama sum hjá teimum vaksnu, tvs. at nr. 1. fær 40 stig og síðani fá teir næstu rennarnir 34, 30, 26, 23, 20, 18, 16, 14, 12, 10, 9, 8, 7, 6, 5, 4, 3, 2 og nr. 20 og restin fær 1 stig. Fyri at kunna vinna samlað, so skal man hava verið við í minsta lagi 3 av teimum 4 kappingunum. Vinnarir í teimum ymsu bólkunum verða so teir rennarnir sum so hava fingið flest stig tilsamans á Ólavsøku og fáa nummar 1, 2 og 3 steyp til ognar. Sum tað sær út í løtuni, so kunnu allir fýra vinnarnir í báðum teimum eldru bólkunum væntandi sleppa at royna seg í eini kapping, í Danmark í august mánað í ár. Nærri verður at frætta um hetta seinni í summar.

### Firmastafettin broytt

Aftur í ár verður skipa fyri »firma-staffet«. Seinastu tvey árini hevur hon eydnast so mikið væl at roynt verður aftur í ár. Men í ár er ein broyting gjørd, og hon ger tað, at ongin »professionellir« rennari kann verða við, tvs. ongin sum hevur luttikið í 5 km frammanundan kann verða við í staffettini. Henda broyting skuldi gjarna ført við sær at tað verður hugaligari hjá »amatørum« at verða við, og tað skuldi aftur ført við sær at talið á liðum økist. Annars er alt tað sama. Tríggir luttakarir (menn/-kvinnur) frá somu fyirtøku renna eitt umfar, sum er 675 m, í part. Fyrsti luttakari á liðnum byrjar og rennur eitt umfar, næsti luttakari stendur klárur á málinum og fær eitt klapp frá tí fyrsta og rennur síðani avstað, triðji og seinasti luttakari stendur klárur og fær eitt klapp frá tí næsta og rennur síðani avstað, og tá hann kemur á mál er alt liðið komið á mál. Tvs. at 3. maður er avgerandi fyri hvussu liðið klárar seg. Best er um teir 3 luttakarnir frá sama firma hava líka blusir at renna í - so tað verður lættari at halda skil á skiftum. Virkir, stovnar o.l. kunnu tilmelda eitt ella fleiri lið á tríggjar rennarir.

### Heiðursmerkir og steyp

Tá seinasti rennarin er komin á mál, og úrslitini eru greið, verða heiðursmerkir handaði til nr. 1, 2 og 3 hjá bæði gentum og dreingjum í øllum aldursbólkum, meðan tað hjá teimum vaksnu verður latið steyp til vinnaran hjá kvinnum og monnum og heiðursmerkir til nr. 2 og 3. Vinnandi stafett-liðið fær steyp til ognar, umframt at nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerkir. Okkurt leskiligt verður at fáa frá Føroya Bjór, umframt at lutakast verður ímillum allar luttakarnar um gávur frá ymsum stuðlum.

### Tilmelding

Tilmelding fer fram við Telefonstøðina í seinasta lagi 1/2 tíma áðrenn renningarnar byrja, og verða allir luttakarir bidnir um at møta við Telefonstøðina og tilmelda seg í góðari tíð áðrenn renningin byrjar. Luttøkugjaldi er kr. 20 fyri børn, kr. 30 fyri vaksin og kr. 100 fyri firma-staffet. Øll eru vælkomin at verða við og vóna fyrireikarnir at undirtøkan verður minst líka góð sum seinasta ár. At enda vilja fyrireikarnir úr Treystinum ynskja øllum eina góða Norðoyastevnu.



**Mentamálastýrið**
*Mentamáladeildin*

## *Endurlýsing*
## Lærarastørv á Føroya Læraraskúla

**Lærarastørv á Føroya Læraraskúla:** Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi pedagogiskum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla.
Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.
Størvini, sum leys eru at søkja, eru hesi:

**Evning og handarbeiði:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er evning og handarbeiði í grundlærugreinunum og linjugreinunum á læraraútbúgvingini, og í virknisgreinunum á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi á økinum.

**Smíð:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er grundútbúgvingin og linjugrein á læraraútbúgvingini, og smíð í virknisgreinunum á pedagogútbúgvingini.

**Sálarfrøði og serlestur:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er sálarfrøði og serlestur á læraraútbúgvingini og pedagogútbúgvingini.

Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.
Eisini fáa tey, ið sett verða, møguleika at undirvísa á teimum útbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknirnar skulu stílast til Mentamálastýrið, men verða at senda til,

**Føroya Læraraskúla**
**Frælsið 20**
**100 Tórshavn**

og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2002.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um størvini, eru væl komin at seta seg í samband við rektaran, ið er at hitta á tlf. 31 35 01 ella tlf. 22 53 28 og til paulini@flsk.fo

**Mentamálastýrið**
Postsmoga 3279
110 Tórshavn

Felagið 20 ár

FØROYA PEDAGOG FELAG

Leygardagin 1. juni verður felagið 20 ár

Felagið hátíðarheldur dagin við móttøku í húsum felagsins í Tungugøtu 1

1. juni kl. 14.00-17.00

Limir, grannar og tey, ið felagið hevur samskifti við, eru hjartaliga vælkomin inn á gólvið

Nevndin






Verkstaðsleiðari

Til væl útgjørda Plátu og Lakkverkstað okkara søkja vit **Leiðara** at byrja skjótast tilber

**Arbei i umfatar:**
Tilrættarlegging av arbeiði
Kundatænastu
Skriva skaðasýn
Fakturera
Og annað, sum leiðarastarv inniberð

Reyni Service er DAF góðskugóðkent og arbeiðir samsvarandi teirra krøvum

Vit meta hetta arbeiði sera spennandi, hevur tað tín áhuga, vilja vit gjarna hoyra frá tær.

Løn eftir avtalu

Umsókn at senda til

Sosialurin - 311820




Boks 1068 · 110 Tórshavn · att. Ova Jacobsen




Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling.

Eisini tørvar okkum ein raskan drong/mann at hjálpa okkum í summar.

Hevur hetta tín áhuga so ring ella skriva til:

P/F Frants Restorff
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060

frants restorff




